## Fogh kann velja

Vil Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, hava starvið sum aðalskrivari í NATO, fær hann tað. Tað sigur ein týðandi NATO-diplomatur við kanadisku tíðindastovuna Canwest News Service. Kanadiski diplomaturin, sum ikki vil leggja navn til, sigur, at tað er umráðandi við javnvág í NATO millum Evropa øðrumegin og londini vestan fyri Atlantshavið hinumegin. Hann vísir á, at amerikanski generalurin er ovasti hernaðarligi leiðarin í NATO, og tí verður aðalskrivarin úr Evropa. Donsk bløð hava gjørt nógv burturúr, at Anne-Mette Rasmussen, kona forsætisráðharrans, hevur sagt arbeiðið sum pedagogur frá sær.



## Ein republikanari afturat

Nú eru tríggir republikanskir ráðharrar í amerikonsku stjórnini. Barrack Obama hevur tilnevnt tann 61 ára gamla republikanska senatorin Judd Gregg handilsmálaráðharra. Judd Gregg er tann triði republikanarin í stjórnini hjá Obama. Hinir báðir eru Robert Gates, verjumálaráðharri, og Ray LaHood, flutningsmálaráðharri. Politiskir eygleiðarar í Washington halda, at Obama fær sær republikanarar í stjórnina fyri at tryggja sær stuðul frá republikanarunum í Kongressini, tá ein stórur hjálparpakki kemur til viðgerðar har seinni í vikuni.

# Í lagi at tosa um hassj

**- Vit hava ilt við at síggja, hvør paragraff í revsilógini er brotin, sigur Finn Ougaard, varafúti, sum ætlar, at kanningin av Rás2 og vertunum í »Vinstra víkiskylda« ikki skal taka langa tíð**

STEVNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var eftir sendingina »Vinstra víkiskylda« á Rás2 mikudagin 14. januar, at løgtingsmaðurin fyri Miðflokkin, Bill Justinussen, valdi at melda Rás2, teimum báðum vertunum, Barbaru Holm og Tjóðhild Patursson og einum ónavngivnum gesti, sum var við í sendingini.

Bill Justinussen var so fortørnaður inn á sendingina, at hann ringdi á politistøðina meðan sendingin var í luftini, fyri at fáa løgregluna at fara oman í Vágsbotn at handtaka unga gestin, sum greiddi frá sínum royndum við at roykja hassj. Hesum eftirlíkaði løgreglan tó ikki, og viku seinni meldaði Bill Justinussen so teimum omanfyri nevndu.



*Finn Ougaard, varafúti, staðfestir, at trupult er at síggja, hvør paragraff í revsilógini Rás2 og vertirnir í »Vinstru víkiskyldu« skulu hava brotið*

Sosialurin royndi í dagavís at fáa fatur á fútanum, Karen Marie Olesen, men uttan úrslit. Vit vildu í fyrsta lagi fáa staðfest, um fútin hevði móttikið meldingina, og um so var, eftir hvørjari paragraff í revsilógini málið varð kannað út frá.

Ikki fyrr enn í morgun hevur tað eydnast at fingið fatur á, ikki fútanum, sum er burturstødd, men á varafútanum, Finn Ougaard. Og hann váttar, at málið verður kannað.

Í løtuni arbeiðir fútaskrivstovan út frá §742.2 eftir einum »formodning om, at et strafbart forhold er begået«.

- Trupulleikin er, at vit vita ikki, hvør paragraff er brotin í hesum førinum, sigur Finn Ougaard, varafúti.

### Sosialin sum grund

Sum skilst hongur kanningararbeiðið eitt sindur í leysari luft, tí fútaembætið ikki í løtuni reiðiliga dugir at síggja, hvør paragraff í revsilógini er brotin.

- Vit hava bara fingið eina generella melding, har ikki verður víst til nakra paragraff í revsilógini. So tað, sum vit millum annað gera í kanningararbeiðinum, er at granska tær greinar, sum eru skrivaðar um málið, serliga í Sosialinum frá 22. januar, sigur Finn Ougaard, varafúti.

Hann sigur víðari, at fyrr enn íblandaðu partarnir í málinum eru kunnaðir um, hvar málið til løtuni liggur, ber ikki til hjá honum at úttala seg til miðlarnar.

Men tað stutta av tí langa er, at um tað ikki ber til at staðfesta, at nøkur paragraff í revsilógini er brotin, ber illa til at gera nakað ítøkiligt við málið.

- Vit ætla kortini at royna at gera so skjótt av í hesum málinum, sum tað nú einaferð ber til, lovar Finn Ougaard, sum altso í løtuni ikki kann siga so nógv meira, fyrr enn partarnir í málinum er kunnaðir.

# Góður januar mánaður

**Skattainntøkurnar í januar í ár liggja áleið á sama støði sum í januar í fjør. Og tað er stór broyting í mun til november og desember í fjør**

SKATTAINNTØKA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hóast krepputekin síggjast allastaðni í samfelagnum við hópuppsagnum innan serliga tað privata, men eisini innan almennar stovnar – orsakað av sparingum – so royndist januar mánaði óvanliga væl hvat skattainntøkum viðvíkur.

Seinastu mánaðirnar í fjør minkaði skattainntøkan munandi í mun til somu mánaðir árið fyri. Í november í fjør minkaði skattainntøkan í mun til sama mánaða árið fyri við 8%, og í desember var støðan uppaftur nógv verri. Tá var skattainntøkan heili 22% lægri enn í desember 2007, vísa hagtøl hjá TAKS.

Aðrastaðni í blaðnum sæst, at arbeiðsloysistølini rúka upp, frá 261 í juni í fjør til 749 í dag, og smá 200 fleiri enn 4. januar. Kortini hevur skattainntøka fyri januar verið áleið hin sama – enntá 1% hægri – sum í januar í fjør.

Tað upplýsir Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri. Hann sigur, at avgjaldstølini ikki eru liðugt uppgjørd enn, men metingar siga, at hesi tøl ikki verða eins ljós sum skatturin.

- Vit vænta eina minking í inntøkunum frá mvg og øðrum avgjøldum. Hetta eru avgjøld, sum stava frá forbrúkinum, og tað er okkara greiða meting, at hesin tølini fara at minka. Hvussu nógv ber ikki til at siga enn, men tølini verða klár seinni í vikuni, og tá ber betur til at meta um, hvussu inntøkurnar fara at broytast, sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri í stuttari viðmerking.

Í hvussu er má tað metast rættiliga postitivt, at skattainntøkurnar hóast hóttafall allastaðni kortini vóru 1% hægri í januar í ár í mun til sama mánaða í fjør.

*Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri. Fær ikki rættiliga úttala seg um útlitini, fyrr enn avgjaldatølini fyri januar eru klár*

